## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og stundum regn. Seinnapartin minni vindur av landsynningi og bert okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eitt skifti regn ella vátaslettingur. Seinnapartin yvirhøvurt turt. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig. Sunnudagin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

# Latið børnini í ljós klæði

### Ferðslutrygd skipar fyri átaki til tess at fáa børnini at nýta endurskin

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

»Vit síggjast« er átak, sum verður gjørt fyri at fáa fólk at nýta endurskin. Í hesum døgum fáa allir næmingar í 1., 2., 3., og 4. flokki í fólkaskúlanum hvør sítt




endurskin. Endurskinini eru av tí slagnum, sum kunnu festast um bein ella arm við karðalási.

Føroya Sparikassi og Føroya Lívstrygging rinda framleiðsluna av endurskinunum, meðan Ferðslutrygd stendur fyri at fáa endurskinini út til skúlarnar og at kunna um vandamálið.

– Ferðsla í myrkri er 2–3 ferðir so hættislig, sum ferðsla í dagslýsi. Serliga eru tað fólk til gongu, ið eru í vanda - í vanda at verða ákoyrd av bilum, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd.

Hann sigur eisini, at ein vanlig misskiljing er, at fólk halda, at tey altíð verða sædd av bilførarum.

– Ljósini á bilunum tykjast jú so sterk, tú kennir teg rætt og slætt »baðaðan« í teimum, og tað er ein sannroynd, at tað ber til at lesa í bók í glæmuni frá einum bili, sum er 2-300 m. burturi, sigur hann.

Men hjá bilføraranum er støðan hin øvuta.

Á myrkum vegi, har eingi gøtuljós eru, sær bilførarin í mesta lagi tað, sum fjarljósini hjá bilinum megna at lýsa upp, tað er 100 m – við nærljósunum er tað 30 m. Men ljósini á bilum eru í veruleikanum ikki sterkari enn so, enn at einans tað, sum er ljóst á liti, verður sjónligt fyri bilføraran.

– Tí er sera avgerðandi, hvønn lit klæði okkara hava. Eitt fólk í ljósum klæðum kastar uml. 80% av ljósinum aftur, meðan eitt fólk í dimmum klæðum einans kastar eini 5% av ljósinum aftur til bilin. Endurskin harafturímóti, er gjørt úr tilfari, sum megnar at kasta næstan 100% av ljósinum, sum lýsir á tað, aftur til ljóskelduna.

Jón Kragesteen biður okkum kanna hetta sjálv okkurt vetrarkvøldið - ella vetrarmorgun, tá ið myrkt er…

– Bestu ráðini eru tí at vera í ljósum klæðum, tá ið tú skal út at ganga í myrkri. Hetta eiga foreldur at hugsa um, tá ið klæði verða keypt. Um so skuldi verið, at bara myrk klæði eru til taks, so minst í øllum førum til endurskin.

## FAKTA UM ENDURSKIN:

**Jú ljósari klæði vit hava, jú betri síggjast vit, keyp tí ljós vetrarklæði.**

**Nýt altíð endurskin,tá ið tú skalt út at ganga í myrkri.**

**Nógv sløg av endurskini eru, umframt tey sum nú verða givin út til næmingarnar í 1.-2.-3. og 4. flokki. Niðanfyri eru nevnd nøkur dømi:**

**Bleyt endurskin at seyma ella at líma á jakkar, buksur, venjingarbúnar o.s.fr.**

**Endurskin at líma á skógvar og stúlvar, sum, hóast lítil, síggjast sera væl.**

**Endurskinsspjøldur at hanga í klæðini, ella at festa í ein lumma, so tey kunnu goymast, tá ið tey ikki verða brúkt.**

**Eisini er gott er at seta endurskin á barnavognar, sletur, súkklur o.t. Og sjálvsagt skulu vit seta endurskin á tey fýrføttu, tað verið seg hund, kettu, hest og ikki minst seyð.**

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | 14 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 12 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷3 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷12 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 16 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | – |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 966 hPa vestan fyri Skotland fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið haðani til Føroya stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/11 kl. 06⁰⁰– 12/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 16,0 mm – mált frá 11/10 kl. 06⁰⁰– 12/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 105,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

11. nov.: Fyrra kvarter
16. nov.: Mánin longst frá jørðini
20. nov.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. nov | 01.59 | 14.20 | 00.59 | 13.20 | 01.14 | 13.35 | 03.59 | 16.20 | 04.59 | 17.20 | 00.14 | 12.35 | 11.35 | 23.56 | 02.14 | 14.35 | 03.14 | 15.35 | 01.44 | 14.05 | 02.59 | 15.20 |
| 14. nov | 02.41 | 15.00 | 01.41 | 14.00 | 01.56 | 14.15 | 04.41 | 17.00 | 05.41 | 18.00 | 00.56 | 13.15 | — | 12.15 | 02.56 | 15.15 | 03.56 | 16.15 | 02.26 | 14.45 | 03.41 | 16.00 |
| 15. nov | 03.20 | 15.39 | 02.20 | 14.39 | 02.35 | 14.54 | 05.20 | 17.39 | 06.20 | 18.39 | 01.35 | 13.54 | 00.35 | 12.54 | 03.35 | 15.54 | 04.35 | 16.54 | 03.05 | 15.24 | 04.20 | 16.39 |
| 16. nov | 03.58 | 16.17 | 02.58 | 15.17 | 03.13 | 15.32 | 05.58 | 18.17 | 06.58 | 19.17 | 02.13 | 14.32 | 01.13 | 13.32 | 04.13 | 16.32 | 05.13 | 17.32 | 03.43 | 16.02 | 04.58 | 17.17 |

5 707265 100036 >